**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingur

Á B5 er eitt fast starv sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,8 leyst at søkja til setan 1. mai 2003 ella eftir avtalu.

Deildin er ein kirurgisk deild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálssjúkum. Á deildini er pláss fyri 25 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á B5 á telefon 31 35 40, lokal 105 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 499 L, e-postur ceci@ahs.fo

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi:**
- sum hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- sum hevur fakliga vitan og royndir innan kirurgiskari sjúkrarøkt
- við fleksibiliteti og góðum samstarvsevnum
- sum er opin og positiv
- sum vil søkja mennandi avbjóðingar

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 24. apríl 2003 kl. 12.00.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar

Hesi størv á B7 sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum eru leys at søkja til setan 1. juni 2003, ella eftir avtalu:

- fast starv á fullum starvsbrøki
- avloysarastarv á starvsbrøki 0,5 til 29. februar 2004
- avloysarastarv á starvsbrøki 0,8 til 31. oktober 2003

Deildin hevur 15 seingjapláss og tekur sær av sjúklingum við m.a. onkologiskum-, nýra-, lunga- gikta- og ryggjasjúkum v.m.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinskari røkt og viðgerð
- góð samstarvsevni

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Evu Mortensen, deildarleiðara á B7, telefon 31 35 40, lokal 107 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 300, e-post asap@ahs.fo.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin** er 28. apríl 2003 kl. 12.00.

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Køkshjálp

Til køkin á Landssjúkrahúsinum er eitt fast starv sum køkshjálp á starvsbrøki 0,8875 leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Harumframt verður søkt eftir 3 køkshjálpum sum summarferiuavloysarar í tíðarskeiðinum 1. juni - 31. august 2003.

Køkurin á Landssjúkrahúsinum ger mat til umleið 300 sjúklingar umframt starvfólkamatstovuna.

**Arbeiðsuppgávur:**
- søla og servering í matarhøllini
- luttaka í framleiðsluni
- reingerð

**Førleikakrøv:**
- viðkomandi starvsroyndir
- góð samstarvsevni
- ábyrgdarsemi
- sjálvstøðugleiki

**Lønar- og setanarviðurskifti** smb. sáttmálan hjá avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri upplýsingar** fáast við at venda sær til leiðandi økonomuna, Gudna á Rógvi Joensen, tlf. 00298 313540, lokal 274 – e-postur kokur@ahs.fo

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin** er 24. apríl 2003 kl. 12.00

# »Rejsehuset Kurselskabet«

Leygardagin 5/4 kl. 16.00 heldur Ryszard Nickel frá »Rejsehuset Kurselskabet« fyrilestur um túrar til frama fyri heilsuna, til Póland og onnur lond, fyri fólki við gikt og øðrum, ið bara vilja »forkela« seg sjálvi.

Fyrilesturin verður í Skálanum í Tórshavnar kommunuskúla leygardagin kl. 16.00.

# Javni bjóðar til fund

**á Hotel Hafnia leygardagin 5. apríl.**

**Kl. 14.00 Almennur fundur:**
»Tryggingarmøguleikar hjá fólki við menningartarni«. Bartal Kass frá Føroya Lívstrygging og Hildubjørg frá Tryggingarsambandinum Føroyar greiða frá.

**Kl. 15.30 Ársaðalfundur**
Skráin: Samb. lógirnar hjá felagnum.

Vælkomin á fundirnar.

JAVNI **Økisnevndirnar og starvsnevndin**

Felagið
Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Julianna Boys
Páskabingo leygarkvøldið 5. apríl kl 20.00
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

i
Sosialurin

# Framsýning í Kollafirði

Framsýning av handaligum næmingaarbeiði verður í skúlanum í Kollafirði sunnudagin 6. apríl kl. 14.00-19.00.

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg



# HEILSANIR



**Góða Jóhanna**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 2. apríl. Nær fært tú koyrikortið?
**Heilsan Pætur**



**Góði fitti Ari**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 3. apríl. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Bestu heilsanir Turið, Uni og Rói**



**Góða Jóhanna**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 2. apríl.
**Mamma og babba**



**Góða Gnippa**
Vit fara at sakna teg.
**Heilsan Røntgendeildin**



**Góði Jákup gubbi á Skælingi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum.
**Árni, Jóhan og Torkil**



**Góða Jona Sølvia**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 4. apríl.
**Heilsan Viljormur, mamma og babba**



**Góði elskaði Bárður**
Hjartaliga tillukku á tínum 18 ára føðingardegi 4. apríl. Jesus pápi signi framtíð tína. Klemm
**Mamma, Jan, Hugin Terji, Hjalte og Trygve**



**Góði elskaði Ari**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 3. apríl. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Bestu heilsanir mamma og Emil**



**Góði elskaði Gilli**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Øll góð ynskir í framtíðini.
**Ynskja mamma og pápi**



**Góða lítla**
Hvør skuldi trúð at hendan verður 60 ár?
**Heilsan J.I.S.T.A.**



**Góða gumman**
Hjartaliga tillukku við degnum. Her hevði tú tað strævið at koma uppá toppin.
**Heilsan Gisli, Hilmar, Allan og Bjørgvin**



**Góða fitta Bjørk Matras**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegi tínum 3. apríl.
**Ynskja omma og abbi á Argjum**



**Góði stóribeiggi**
Tillukku á tínum 18 ára føðingardegi 4. apríl. Muss og klemm.
**Hjalte og Trygve**



**Góða Emma**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta ári. Jesus pápi veri hjá tær. Vit elska teg.
**Mamma og babba**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...........................................................
Bústaður: ...........................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«